# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 5. mars 2019
Mál nr.: 19/00057
Málsviðgjørt: SPS

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), løgtingslóg um broyting í løgtingslóg í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin) (Striking av handahavapartabrøvum og tøkniligar rættingar)**

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Lógaruppskot |
|---|---|
| | **§ 1**<br>Í løgtingslóg nr. løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg, sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 48.** ...<br>Stk. 2. Kapitalpartar kunnu gevast út við navni. Um so er, kunnu viðtøkurnar áseta avmarkingar í umsetiligheit ella viðvíkjandi útloysn av partabrøvum. Partabrøv kunnu eisini verða givin út til handhava. | **1.** § 48, stk. 2, 3. pkt. verður strikað. |
| **§ 49.** Tann, ið ognar sær ein kapitalpart við nominellum virði, kann ikki útinna tey rættindi, sum eru hjá kapitaleigara, uttan so at ognarin er uppskrivaður í eigarabókini, ella ognarin hevur fráboðað og skjalprógvað ognan sína. Hetta er tó ikki galdandi fyri rættin til vinningsbýti og onnur útgjøld og rættin til nýggjar kapitalpartar í sambandi við kapitalhækking. | **2.** Í § 49 verða sum stk. 2 - 4 sett:<br>*"Stk. 2.* Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum kann ikki útinna |

| | |
|---|---|
| | tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so, at ognarin hevur givið fráboðan til felagið um sín ognarhald.<br>Stk. 3. Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum kann ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57 a ella § 58, ella<br>*Stk. 4.* Høvuðsleiðslan hevur ábyrgdina av at hava eftirlit við, um ein ognari lýkur treytirnar í stk. 1 -3.” |
| **§ 319**. Brot á § 1, stk. 3, § 2, § 3, stk. 1, §§ 10 og 15, § 24, stk. 2, § 30, § 32, stk. 2 og 3, § 33, stk. 4, § 38, stk. 2, § 42 a, § 44, stk. 1, § 50, stk. 1, § 51, stk. 1, 2 og 6, § 52, § 53, stk. 1 og 2, §§ 54-56, § 57 a, stk. 1-3, §§ 58-61, 89, 98 og 99, § 101, stk. 3, 4, 7 og 8, §§ 108 og 113-119, § 120, stk. 3, §§ 123, 125, 127-134, 138, 139, § 139 a, stk. 1, nr. 1, § 160, 3. pkt., § 179, stk. 2, § 180, § 181, 3. pkt., § 182, stk. 3, § 190, stk. 2, 3. pkt., § 192, stk. 1, § 193, stk. 2, §§ 196, 198 og 202-204, § 205, stk. 1, § 206, § 207, stk. 3, § 210, § 214, stk. 2 og 3, § 215, stk. 1, § 218, stk. 2, § 227, stk. 2, §§ 228 og 234, § 291, stk. 6, § 292, stk. 3, § 299, § 301, stk. 2 og 3, og §§ 306, 308, 309, 309 a, 309 b og 311 verður revsað við bót. Eitt felag, sum ikki rættar avgerðir, tiknar í stríð við § 206 ella § 210, verður revsað við bót. | **3.** Í § 319, stk. 1 verður aftan á “.44, stk. 1,” sett: “49, stk. 4,”. |
| | |
| | **§ 2**<br><br>Í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **14.** Í § 27, stk. 1, nr. 4, verður “at ársfrásøgn kapitalfelagsins ikki verður grannskoðað” broytt til: “at kapitalfelagsins ársroknskapur o.a. ikki verður grannkoðaður”. | **1.** Í § 1, nr. 14 verður “at ársfrasøgn kapitalfelagsins ikki verður grannskoðað” broytt til: “at ársfrásøgn kapitalfelagsins ikki skal verða grannskoðað”. |
| **34.** Aftan á § 57 verður sett:<br><br>*“Skráseting av smærri nøgd av handhavapartabrøvum*<br>**§** 57 a. Tann, sum hevur útvegað sær eitt ella fleiri handhavapartabrøv, sbr. § 48, stk. 2, 3. pkt., og sum hevur minni enn 5 prosent | **2.** Í § 1, nr. 34 verður í § 57 a, stk. 1 “sbr. § 48, stk. 2, 3. pkt.,” strikað. |

| | |
|---|---|
| av atkvøðurættinum hjá felagskapitalinum ella minni enn 5 prosent av felagskapitalinum, skal í seinasta lagi 2 vikur eftir útveganina skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. tó stk. 4. | |
| **34** Aftan á § 57 verður sett:<br><br>*"Skráseting av smærri nøgd av handhavapartabrøvum*<br>§ 57 a. ...<br>Stk. 4. Stk. 1 og 3 verða ikki at nýta, um talan er um partabrøv í einum felag, sum hevur partabrøv, ið eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði. | **3.** Í § 1, nr. 34 verður § 57 a, stk. 4 orðað soleiðis:<br>"Stk. 4. Skyldan at skráseta eftir stk. 1 og 3 er ikki galdandi, um tey handhavapartabrøv, sum eru ávikavist ognað og avhendað, eru tikin upp til handils á einum reguleraðum marknaði." |
| **49.** Í § 92, stk. 1, pkt. 2 verður "§ 12, stk. 1, pkt. 3" broytt til: "§ 7 c". | **4.** Í § 1, nr. 49 verður "pkt. 3" broytt til: "3. pkt". |
| **51.** Í § 98 verður "grannskoðað ársfrásøgn" broytt til: "ársfrásøgnin". | **5.** Í § 1, nr. 51 verður "grannskoðað ársfrásøgn" broytt til: "grannskoðaða ársfrásøgnin". |
| **57.** Í § 134, 2. pkt. verður "móðurfelagið" broytt til: "móðurfyritøkan". | **6.** Í § 1, nr. 57 verður "móðurfelagið" broytt til: "móðurfelagnum" og "móðurfyritøkan" broytt til: "móðurfyritøkuni". |
| **65**. Í § 156, stk. 1, nr. 3 verður í staðin fyri "ársfrásøgn felagsins er fevnd av" sett: "felagsins ársroknskapur o.a. er fevndur av". | **7.** Í § 1, nr. 65 verður "stk. 1" broytt til: "stk. 2". |
| **105.** Í § 237, stk. 3, nr. 6 verður "partabrøv" broytt til: "kapitalpartar". | **8.** Í § 1, nr. 105 verður "partabrøv" broytt til: "partabrøvum". |
| **118.** Í 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður "samanleggingaræetlan" broytt til: "upplýsingar um ætlaðu samanleggingina, heruppií eina møguliga samanlegginaræetlan". | **9.** § 1, nr. 118 verður orðað soleiðis: "Í § 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður "samanleggingaræetlanini" broytt til: upplýsingum um ætlaðu samanleggingina, heruppií eina møguliga samanleggingaræetlan". |
| **145**. Í § 265, stk. 2 verður "kloyvingarætlanin" broytt til: "Upplýsingum um ætlaðu kloyvingina, heruppií eina møguliga kloyvingarætlan". | **10.** § 1, nr. 145 verður orðað soleiðis: "Í § 265, stk. 2 verður "kloyvingarætlanini" broytt til: "upplýsingum um ætlaðu kloyvingina, heruppií eina møguliga kloyvingarætlan". |
| **154.** Í § 271, stk. 1, 2. pkt. og í 276, stk. 1, 2. pkt., verður "ein metingarfrágfreiðing, sum verður gjørd eftir §§ 36-38" broytt til: "ein metingarfrágfreiðing, sum verður gjørd eftir §§ 36- 37, ávikavist ein leiðsluváttan eftir reglunum í § 38". | **11.** Í § 1, nr. 154 verður "§ 276, stk. 1, 2. pkt." broytt til: "§ 276, stk. 1, 3. pkt." og "ein metingarfrágreiðing" verður tvær staðni broytt til: "eina metingarfrágreiðing". |
| **158.** Í § 279, stk. 1 verður "har umskipanarætlanin verður greinað og grundað" broytt til: "har greitt verður frá og gundgivið fyri umskipanini, heruppií eini møguligari umskipanarætlan, sbr. tó stk. 2." | **12.** § 1, nr. 158 verður orðað soleiðis: "Í § 279, stk. 1 verður "har umskapanarætlanin verður greinað og grundað" broytt til: "har greitt verður frá og gundgivið fyri umskapanini, heruppií |

| | |
|---|---|
| | eini møguligari umskapanarætlan, sbr. tó stk. 2.” “ |
| | |
| | **§ 3**<br>Í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012 og løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar: |
| *Stk. 3*. Bortset fra reglerne i kapitel 1, 2 og 7 finder denne lov ikke anvendelse på enkeltmandsvirksomheder, interessentskaber og kommanditselskaber. Íognarfeløg og kommandittfeløg skulu tó fráboðast til skrásetingar í kt-skipanini hjá Skráseting Føroya, og §§ 10-16 eru samsvarandi galdandi fyri hesi feløg, um allir íognarar ávíkavist komplementarar eru:<br>1) partafeløg, smápartafeløg, partnarafeløg (kommandittfeløg) ella feløg við samsvarandi felagsformi ella<br>2) íognarfeløg ella kommandittfeløg, har allir íognarar ávíkavist komplementarar eru fevndir av nr. 1.<br>Stk. 4. ... | **1.** § 2, stk. 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis: “Undantikið reglurnar í kapitli 1, 2 og 7 og § 15 f, verður hendan lógin ikki nýtt upp á einstaklingafyritøkur, íognarfeløg og kommanditfeløg.” |
| **§ 15. e** | **2.** Aftan á § 15 e, men áðrenn yvirskriftina yvir § 16, verður sett:<br>“§ 15 f. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at §§ 55, 56 og 58 í vinnufelagalógini við neyðugum tillagingum skulu verða nýttar upp á eitt ella fleiri sløg av fyritøkum, sum eru fevndar av hesi lóg. |
| | |
| | **§ 4**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 1. januar 2020.<br>*Stk. 2.* § 49, stk. 3, verður sett í gildi við kunngerð frá landstýrismanninum.<br>*Stk. 3.* Feløg, sum áðrenn ígildiskomu lógarinnar hava samtykt heimildir sbrt. § 155, stk. 1 og 2 í vinnufelagalógini, sum innihalda møguleika at geva út |

| | |
|---|---|
| | handhavapartabrøv, kunnu nýta hesar heimildir fram til 1. januar 2021.<br>*Stk. 4.* Handhavapartabrøv, sum eru givin út eftir § 48, stk. 2, 3. pkt. eftir higartil galdandi vinnufelagalóg, ella sum verða givin út eftir heimildum, nevndar í stk. 2, kunnu framvegis vera nýtt eftir, at lógin er komin í gildi. |